# Spurningar og svør frá aðalfundinum í 2014

**Ber til at fylgja við í, hvørjum nevndin arbeiðir við?**

Besta boðið er umvegis títt umboð í brúkararáðnum fyri Landsnet.

**Nú øll servitan verður savnað í KTL, hvussu skulu aðalráðini greiða sína eftirlitsskyldu innan KT trygdarøkið, so ein ordilig grannskoðan verður gjørd?**

Lætt verður munandi um eftirlits-skylduna, fáa ráðini eina grannskoðaraváttan. Eftir míni meining, so hava ráðini ongan møguleika at fremja veruligt KT eftirlit á stovnunum, hava tey ikki grannskoðaraváttan.

**Skilti eg Michael Ørnø rætt, at teirra strategi var at goyma allar dátur innan danska markið? Í so fall áttu vit so eisini at gjørt tað í Føroyum? Hugsi m.a. um peningastovnarnar.**

MØ: Lovgivning. Dropbox, SkyDrive bliver brugt til at udveksle data. Vi bliver nødt til at lave et alternativ, G-Box, som gemmer data indenfor landets grænser. KTL hyggur at eini loysn, sum eitur SkyDrive Pro og, sum koyrir á SP 2013

**Hvør er munurin
millum tað danska og føroyska sentrala KT konseptið – hvørjar tænastur, kostnaðarstig og prísásetingarmodel?**

Der er utrolig mange ligheder. Vi har mange forskellige kunder. Små kunder siger, vi skal varetage alle ting, hvor store kunder kun beder om serverkapacitet. Den store forskel er, at vi varetager fagsystemers drift, bl.a. af ESDH systemer. Ellers er en stor forskel, at Statens-IT er dyrere end KTL. Vi har også fået lavet en benchmark, som viste, at vi ligger under gennemsnittet, men ikke så langt under som Landsnet gør.

**Nær verður SharePoint 2013 tøkt?**

Tað er tøkt nú. Frá 1. juli verður 'SharePoint 2013' høvuðspallurin, og her kunnu vit veita vissu fyri høgum tænastustigi.

**Eru brúkararnir enn tvungnir at vera limir í Statens IT?**

Nei

**Átti KTL ikki at boðið opensource alternativ til skipanir?**

Firefox liggur í Software Center á teldunum og KTL kannar møguleikarnar at leggja Libre Office í Software Center

**Nær verður Windows 8 tøkt?**

Windows 8.1 er tøkt nú til nýggjar teldur. Vit arbeiða støðugt við at leggja drivarar inn til eldri teldur soleiðis, at tær eisini kunnu koyra Windows 8.1

**Nær fáa vit felags 360 pall? Ovurstór íløga hjá lítlum stovni at skifta til 360. Helst stórar sparingar hjá landinum.**

Einki ítøkiligt í umbúnaði. Sama ynski frá nógvum stovnum, so hetta umhugsa vit á KTL at gera nakað við. Her er upplagt at hyggja at átakinum, sum Statens-IT hevur í umbúnaði at seta í verk.

**Hvussu nógv á Landsneti hava ”tunnar klientar”, og hvussu nógv hava farteldur/pc?**

900 vanligar teldur,
600 tunnir klientar.

**Hví skulu vit velja loysnina við eksternum brúkarum 300 kr/mðr, tá ið vit kunnu hava ekstranet nógv bíligari?**

Eksternir brúkarar eru brúkarar á stovninum, sum hava ein brúkara at innrita við, fyri at fáa fatur á onkrari fakskipan. Hesir brúkarar fáa ikki atgongd til Office og hava heldur ikki teldupostkassa ella atgongd til fíl-mappur á netinum. Hevur stovnurin tørv á at geva fólki, sum ikki er sett á stovninum, atgongd til eina SharePoint síðu, so verður hetta roknað sum ein SharePoint brúkari og tvs. 50 kr/mðr.

**Hví brúka tit ikki 360 í staðin fyri intranet á Landsneti?**

Vit meina ikki, at tað loysir sama tørv. 360 er fyrst og fremst til journal og skjalahandfaring. Intranetið er, umframt skjalahandfaring, eisini eitt felags stað, har tíðindi, kalendarar, handbøkur o.tíl. liggja.

**Skulu vit hava atgongd til Cloudloysnir um tað er so ótrygt?**

Sum útgangsstig meina vit ikki. Tað valdast sjálvsagt hvørjar tænastur ,og ikki minst hvørjar dátur, umhugsað verður at brúka cloudloysnir til.

**G Cloud? Nær fær tað almenna cloud? ”Private stovnscloud”**

KTL hyggur at líknandi loysn at bjóða stovnunum sum Statens IT. Talan er um innbygda SP2013 loysn kallað SkyDrivePro. Meira um hetta seinni í 2014

**Hevur KTL politikk um Dropbox, SkyDrive, iCloud og tílíkt?**

Nej, men leiðreglur fyri brúkarar*, sum vit mæla øllum stovnum at taka í nýtslu, mæla til ikki at brúka hesar goymslur til arbeiðs-dátur. KTL hevur í dag trygga loysn innanhýsis á Landsneti

*Sum liggur sum fylgiskjal í sáttmálanum millum stovnin  og KTL

**Liðugt uppsettar teldur/uppsettir teldlar, var tað nakað, KTL kundi átt inni?**

KTL eigur í dag einstakar teldur at lána út. Teldlar hava vit ikki. Hava ikki í umbúnaði at hava nógv sløg av teldlum inni, men umhugsa at hava nakrar Surface at lána út.

**Verður arbeitt við at finna fløskuhálsar á netinum (samnet) og at betra ferðina?**

Ferðin verður fyrst og fremst avgjørd av, hvørja ferð haldið hevur. Vil man hava hægri ferð, so ber til at velja eitt hald við hægri ferð. KTL kannar javnan ferðina fyri at tryggja, at stovnarnir fáa tað, teir gjalda fyri.

**Fer KTL í framtíðini at vera meira involverað í at hýsa og reka fakskipanir?**

Fleiri stovnar kundu hugsað sær hetta. Vit eru í ferð við at gera eina viðlíkahaldsavtalu við Formula um at reka felagsinstallatiónina av 360, sí annars svar um felags 360 pall.

**Trygdarpolitikkur**
**– verður hetta sum partur av verandi tænastu/kostnaði ella eykakostnaður?**

Tað, sum kemur afturat tí, sum er í dag (tað at grannskoða fakskipanir og tað sum liggur á stovnunum), skulu stovnarnir rinda fyri. At samskipa hesa uppgávuna við Gjaldstovuna verður munandi bíligari, enn um stovnarnir hvør í sínum lagi gera tað. Men hetta, at fáa trygdina upp á pláss, tað avger stovnurin.

**Hvat gera vit, um Microsoft fer konkurs í 2015?**

Hetta halda vit ikki vera sannlíkt, og hava tí ikki viðgjørt henda spurning. Skuldi MS farið á húsagang, eiga vit rættin til forritini, og kunnu tí skil halda fram sum í dag, inntil vit hava fingið lagt okkara umhvørvi um til aðra tøkni.

**Kostar tað 50 kr/mðr fyri hvørja fartelefon, sum kann taka ímóti telduposti?**

Nej, fyri hvønn brúkara, sum hevur eina ella fleiri eindir, sum taka ímóti telduposti.

**Vit hava savnað 360**
**á felagspalli á Landsneti.**
**Hvar er okkara sparing, borið saman**
**við 35% sparing hjá statinum?**

Felags 360 loysnin hjá Landsneti
kostar árliga uml kr. 115.000.
Høvdu somu stovnar, sum koyra
á felags 360, havt hvør sína loysn,
høvdu útreiðslurnar verið kr. 732.600.
Talan er einans um útreiðslur fyri
licensir og at reka servarar.

**Hvat fatar Samnet um?**

Samnet er sjálv linjan millum stovnin og Landsnet. Øll ferðsla millum skipanir og internet fer umvegis samnetið.
GG: Vit hava ikki flokkað okkara net at kunna nýtast til IP telefoni.

**Kunnu vit síggja grannskoðaravátttanina frá 2012?**

Ja, stovnarnir kunnu biðja um váttanina, sum vit so senda stovnunum.